

# Oljurisarnir selja av ognum sínum nær Føroyum

**Jan Müller**

23.03.2015 - 02:25

Oljan.fo

Avleiðingarnar av lækkandi oljuprísinum síggjast aftur alla staðni og eisini her um okkara leiðir. Fleiri av teimum stóru oljufeløgunum royna at selja partar av sínum ognum tvs. loyvi í eitt nú Norðsjónum og vestan fyri Hetland. Blaðið The Telegraph skrivar, at oljufeløg sum Total, ConocoPhillips, BP og Shell og nú eisini E.on royna at selja partar av sínum aktivum ella heilt sleppa úr økjum, har oljuleiting og framleiðsla eru meira kostnaðarmikil enn í øðrum pørtum av heiminum.

Tað er greitt, at hetta er ikki hugaligur lesnaður fyri eitt nú føroyskar oljumyndugleikar, sum vóna, at oljufeløg fara at vísa føroysku undirgrundini áhuga aftur, nú eingin boring er eftir á skránni.

Blaðið skrivar, at týski orkurisin E.on nú hevur boðað frá, at hann ynskir at taka seg úr Norðsjónum, sum tá eisini fevnir um økið vestan fyri Hetland. Hetta er ein beinleiðis avleiðing av tí lága oljuprísinum. Felagið ætlar at selja ognir fyri ikki minni enn 10 mia. kr. Hesar eru út fyri Skotland, Ongland, Hetland og Norra.

Sambært blaðnum eru longu oljuognir fyri eitt virði uppá 60 mia. kr. til sølu. Feløgini, sum selja, eru Total, ConocoPhillips, BP og Shell. Hetta eru feløg, sum hava fleiri loyvi og framleiðandi oljukeldur vestan fyri Hetland eisini, tvs. í okkara næsta grannalag.

Hvat viðvíkur økinum vestan fyri Hetland, so hevur verið frammi, at Total roynir at selja 20% av Laggan Tormore gassfeltinum, sum fer undir framleiðslu seinni í ár. Eisini hevur ConocoPhillips í umbúnað at selja sín part av risastóra Clair-oljufeltinum, sum liggur miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið.